## DAGSINS MEINING

### Hevur savnað og givið íblástur!

Spælimenninir. Landsfundirnir hjá Fiskimannafelagnum. Grand Prix-tónleikakappingin. Politiskir landsfundir. Filmsfelagið Klipp. Barnadansur.... Vit kundu hildið fram, men vit steðga við barnadansinum, og spyrja, hvat nevndu tiltøk hava í felag? Jú, Norðurlandahúsið, sum í dag er 20 ára gamalt.

Annað kunnu vit ikki siga, enn at Norðurlandahúsið hevur havt stóran týdning fyri føroyskt felagslív og føroyska og norðurlendska mentan yvirhøvur. Sigast kann, at Norðurlandahúsið hevur verið ein norðurlendskur sýnisgluggi, hóast tann norðurlendska skráin tykist hava verið minni í seinri árum.

So kunnu vit spyrja, um Norðurlandahúsið hevur verið ein sýnisgluggi fyri føroyska mentan, lív og virki úteftir? Óivað kunnu vit siga, at Norðurlandahúsið er ein sambindingarliður við hini Norðurlondini. Men spurningurin er, um leiklutin ikki kundi verið størri í so máta?

Hinvegin leggja nógvir norðurlendingar - og útlendingar sum heild - leiðina fram við Norðurlandahúsinum. Ikki minst í summarmánaðunum, og tá hevur tað týdning, at okkurt áhugavert og forvitnisligt er at síggja. T.d. ein listaframsýnin, ein frímerkjaframsýning ella okkurt heilt annað. Men tykist hugflogið skorta viðhvørt. Ein kaffimuður er góður, men í sjálvum sær er húsið ikki eitt vitjunarmál í sjálvum sær.

Føðingardagsbarnið eitur Norðurlandahúsið í Føroyum. Hetta er óivað fyri at staðfesta, at tiltøk skulu ikki bara vera í sjálvum húsinum, men at virksemið í húsinum eisini skal síggjast ella hoyrast úr Sumba norður til Hattarvíkar. Um tað er eydnast, er torført at meta um. Fyri tey bæði ella øll fimm, sum kanska eru komin til at hoyra ein floytuspælara ella ein violinsnilling, er konsertin eitt stórt upplivilsi - og so er endamálið jú rokkið!

Summi hava lyndi at halda hánt um norðurlendskt samstarv og siga, at tað er bara fjant og fjas. Men Norðurlandahúsið er eitt gott dømi um, hvussu gott og fruktargott norðurlendska samstarvið er og kann vera. Sum heild kunnu vit siga, at Norðurlandahúsið í Føroyum hevur givið nógvum av okkum góðar løtur. Góð og rík upplivilsi. Tað hevur verið mennandi fyri føroyskt andslív og hevur givið mongum føroyingi royndir og avbjóðingar. Norðurlandahúsið kom sum eitt frískligt várlot, sum framvegis kýnir oyggjarnar.

**Sosialurin**

# Norðurlandahúsið tjúgu ár



**Javnaðarflokkurin**
*8. mai 2003*

Javnaðarflokkurin ynskir Norðurlandahúsinum hjartaliga tillukku, nú tjúgu ár eru liðin, síðan hesin stovnurin fór undir at fáa norður-lendska mentan til Føroya og føroyska mentan til onnur norðurlond.

Við hesum húsinum hevur tað borið okkum til at bera fram afturljóð úr føroyska samleikanum og at menna umhvørvið fyri vøkstri fyri føroyskari mentan í øllum hennara fjølbroytni.

Vit gleðast um, at arbeiðið er gjørt á slíkan hátt, at hetta mentanarhúsið gjørdist ein stovnur, sum fólk veruliga tóku til sín.
Góðan byrð framyvir.

# Føroyingafelagið í Reykjavík 60 ár tann 15. mai

TÍÐINDASKRIV

Leygardagin tann 17. mai verður eitt stórsligið mentunartiltak í Vestnorðurlendska mentunarhúsinum í Hafnarfirði (við síðuna av Fjörukránni). Tiltakið er frá kl. 14:00 til 16:00 er ókeypis og opið fyri øllum.

Dr. Eyðun Andreassen professari í fólkalívfrøði við Fróðskaparsetur Føroya heldur fyrilestur um føroyska dansin (á skandinaviskum)

Havnar dansifelag sýnir ymiskan dans og gestir fáa høvi at luttaka.

Vésteinn Ólason fyristøðumaður í Árna Magnússonar stovni heldur fyrilestur um íslendsk kvæði við sama uppruna sum tey føroysku

Ragnvald Larsen heldur fyrilestur um fyrsta flogsamband Føroya við umheimin/Ísland og stovnan av Flogfelag Føroya

Føroyskur dansur, øll eru vælkomin uppá gólv

Leygarkvøldið 17. mai verður 60 ára hátíðarveitsla í Víkingasali á Hotel Loftleiðum. Húsið opnar kl. 18.30 og farið verður til borðs kl 19.30. Boðið verður upp á durasnaps og borðreitt við trimum rættum og kaffi. Ernst Olsen verður veitslustjóri. Aftaná borðhaldið spæla Twilight til dans. Ymsir gestir vera saman við okkum hetta kvøld m.a. Dr. Eyðun Andreassen fólkalívsfrøðingur, Jákup Simonsen deildarleiðari í mentamáladeild Tórshavnar Kommunu, Þórólfur Árnason borgarstjóri í Reykjavík, Jan Christiansen borgarstjóri í Tórshavn og frú Elsa Maria Bærentsen. 32 fólk úr Havnar Dansifelag hjálpa okkum at seta dám á tann føroyska dansin, sum er ómissandi eitt tílíkt kvöld. Eisini syngur Breiðfirðingakórið fyri okkum.

Vit vænta nógv fólk koma at hátíðarhalda dagin við okkum.

*Heilsan nevndin*

Elin Svarrer Wang,
formaður, 552 2368,
elinwang10@hotmail.com
Marina Svabo Ólason
næst form.,
567 3460 / 896 0791
marina@mi.is
Palma Rasmussen
kassameist.
564 4804 / 865 6993
palmagoa@li.is
Leila Arge, skrivari
565 9255
leila@mi.is
Gunnar Christiansen
nevndarlimur
567 9219 / 822 8837
gcimport@isholf.is
Mortan Holm
tiltakslimur, 862 5237
mch@visir.is
Marianna Dam Vang
tiltakslimur
690 3862 / 588 7179
vangma@hotmail.com


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Støðuleysir tingmenn og løgmálaráðharri »på glatis« í pyntaðum fjarðum

**Kristian Magnussen**
*løgtingsmaður og Rættarnevndarlimur fyri Javnaðarflokkin*



Í blaðgrein í Sosialinum síðsta leygardag undir yvirskriftini »Støðuleysir tingmenn« verða formaðurin í rættarnevndini, Jógvan á Lakjuni, og Høgni Hoydal endurgivnir fyri ymisk sjónarmið um uppskotið hjá Høgna Hoydal at broyta lógina um viðgerð av persónsupplýsingum. Uppskotið varð ikki liðugt viðgjørt, áðrenn tingið fór heim og má tí metast at verða burturdóttið. Uppskotið hevði m. a. um tað var samtykt, steðgað Gjaldskipanini hjá peningastovnunum.

Eg skal ikki bera í bøtuflaka fyri formannin í Rættarnevndini, men tó rósa honum fyri, at hann lat sín iva koma tí ákærda (Elektron/vinnuni) til góðar og ikki ákæranum Høgna Hoydal.

Landssýrismaðurin hevur í sínum grundgevingum fyri at fáa broytt lógina ført fram, at lógin ikki verður umsitin sambært tingsins vilja, og hann hevur í tí sambandinum víst til álitið, ið rættarnevndin lat frá sær, tá lógin um viðgerð av persónsupplýsingum upprunaliga varð samtykt í 2001.

**Landsstýrismaðurin villleiðir**
Í Sosialinum leygardagin verður Høgni Hoydal endurgivin fyri at siga »Tað er ov lætt at siga, at man ikki rættuliga veit, hvat man skal halda. Eg meini, at løgtingið skyldar okkum øllum at taka eina støðu. Við onga støðu at tora at taka lata tingmenn tað vera upp til tilvildarligar peningastovnar at tulka lógina um persónsupplýsingar sum teimum lystir. Tað er ikki haldbær«"

Er endurgevingin røtt, so roynir Høgni Hoydal at villleiða lesaran, tí tað eru ikki tilvildarligir peningastovnar, ið tulka lógina. Tað er Dátueftirlitið, ið tulkar lógina og harvið tingsins vilja, og tað hevur eftirlit við, at lógin verður fylgd. Elektron søkti á vári í 2001 Dátueftirlitið um loyvi til at menna sokallaðu Gjaldskipanina í samstarvi við Pengeinstitutternes Betalingsservice, ið føroysku peningastovnarnir eru partaeigarar í, og fekk hetta loyvi.

Tað sum Høgni Hoydal ætlaði við lógaruppskotinum, aftan á at Elektron í skjótt 2 ár hevur ment eina lógliga skipan, ið er farin at virka, var at ólógliggera hesa afturvirkandi. Harumframt ætlaði hann at fáa løgtingið til, við lóg at múra Elektron inni, soleiðis at fyritøkan framyvir ikki skuldi hava møguleikan at meta um hvat, ið tænir henni best og í síðsta enda pengapunginum hjá borgaranum. Henda framferð sigur nakað um rættarfatanina hjá Høgna Hoydal og eisini nakað um manglandi álit á vinnuna.

Lógin heimilar landsstýrismanninum sum er við kunngerð at áseta reglur um flutning av persónsupplýsingum til útlond, herundir steðga ella avmarka flutningi til útlond. Er tað so, at kunngerðin, ið landsstýrismaðurin lýsti í 2001, og sum Dátueftirlitið hevði við í viðgerðini, tá Elektron fekk loyvi at fara undir at menna Gjaldsskipanina, ikki var nóg greið, so er tað kleyvaskapur hjá landsstýrismanninum, ið ger seg galdandi í hesum máli og átti heldur hann og ikki Elektron, at staðið til svars fyri løgtinginum, um lógin ikki verður umsitin eftir tingsins vilja.

**Samd vinna mælti frá uppskotinum**
Undir nevndarviðgerðini av uppskotinum vóru Felagið Peningastovnar, Elektron, KT-felagið, Kaupting, Føroya Lívstrygging, Tryggingarfelagið Føroyar og Postverk Føroya, á fundi við Rættarnevndina. Ongin av teimum hevði nakað positivt at siga um lógaruppskotið, og fleiri meintu, at uppskotið hevði eitt politiskt sikti, ið ikki var í tráð við endamálið við lógini um viðgerð av persónsupplýsingum. Dátueftirlitið, ið eisini kom á fund við nevndina, metti at teirra arbeiði gjørdist truplari og ógreiðari, um uppskotið varð samtykt.

Øll hesi, ið vóru á fundi við nevndina, hava neyvan nakað ynski um at skaða føroyska KT-vinnu ella at leggja henni forðingar í vegin, hóast Høgni Hoydal møguliga ikki hevur tað álitið á teimum.

Av eini ella aðrari orsøk ynskir Høgni Hoydal at broyta lógina, ið snýr seg um persónsvernd hins einstaka, til eina vinnu-verndarlóg, tó uttan at hann viðurkennur at so er. Heldur enn at undirgrava verandi lóg um persónsvernd, eigur hann at koma í løgtingið við einum uppskotið um vinnuverju, um tað er ynski samgongunar.

**Umsorgan Høgna Hoydals fyri tingsins vilja er hyklarí**
Tá Høgni Hoydal sigur at hann vil hava lógina broytta, tí tað er tingsins vilji, so er tað ikki annað enn hyklari. Hann vísti fullkomna vanvirðing fyri tingsins vilja, tá hann heitti á løgmann um ikki at seta lógina um fólkanøvn í gildi, tá 3/4 av løgtinginum samtykti hana áðrenn valið í 2002.

Hevur Høgni Hoydal so nógva orku, so eigur hann, heldur enn at leggja snávingarsteinar fyri vinnuna, at syrgja fyri at t.d. Tinglýsingin kemur aftur á føroyskar hendur. Atburðurin hjá Høgna Hoydal mótvegis EDV-samstarvinum hjá Elektron við útlond er margháttligur, tá hugsað verður um, at hann sjálvur sendi eina rúgvusmikla dataskrá (Tinglýsingina, ið er føroyskt sermál) av landinum fyri 3 árum síðan, tí danir lovaðu at leggja hana um til EDV skótt og ókeypis. Her er sanniliga talan um upplýsingar, ið eru meira viðkvæmir enn rindan av SEVrokningum og sjúkrakassa ígjøgnum Gjaldsskipanina.

Løgtingið vildi treyðugt, at tinglýsingin fór av landinum, men Høgni Hoydal lovaði tinginum tá (á várið í 2000), at farast skuldi undir beinanvegin at gera eina føroyska skipan, so at tinglýsingin kundi takast heim aftur. Enn er hon í Danmark, undir donskum málsræði og er ikki frítt atkomulig hjá føroyingum, hóast lógin sigar at hon skal verða tað.

Enn er Høgni Hoydal tíbetur í pyntaðum fjarðum, tá hann kallar seg løgmálaráðharra, men fær hann makt sum hann hevur »akt«, so boðar tað ikki frá góðum.

# Avtala um tagnarskyldu

TÍÐINDASKRIV
*Føroya Arbeiðsgevarafelag*

Bæði Føroya Arbeiðsgevarafelag og arbeiðarafeløgini hava fingið álagt tagnarskyldu í sambandi við sáttmálasamráðingarnar.

Limir felagsins hava vent sær til Føroya Arbeiðsgevarafelag við fyrispurningi um, hví felagið ikki úttalar seg um lønarkrøvini, tá ið arbeiðarafeløgini gera tað ferð eftir ferð.

Tað er ein sannroynd, at úttalilsir til fjølmiðlarnar v.m., meðan semingsroyndin fer fram, órógvar semings-royndina og ger tað truplari at fáa eina semju. Tí hava bæði Føroya Arbeiðsgevarafelag og arbeiðarafeløgini fingið álagt tagnarskyldu, meðan semingsroyndin fer fram.

Sambært reglunum hjá semingsmonnunum má alt samskifti, kunning o.l. við fjølmiðlar og onnur fara fram gjøgnum Semingsstovnin. Heimasíða, teldupostur o.l. er at meta sum fjølmiðil.

Føroya Arbeiðsgevarafelag fer at halda seg til hesa avtalu og kann tí hvørki viðgera semingsroyndina, sáttmálakrøv ella annað í fjølmiðl-unum, meðan semingsroyndin fer fram.

# Avlopið minkað meira enn 27 prosent eftir einum ári

**Bárður Nielsen**
*løgtingsmaður*



Í sambandi við at landskassaroknskapurin fyri 2002 varð lagdur fram í farnu viku, hava fjølmiðlarnir borið nógv tøl fram, sum ikki øll hava verið so eftirfarandi. Tí loyvi eg mær at koma við nøkrum rættingum.

**Hvat stóð á fíggjarlógini ?**
Útvarp Føroya segði 1. mai, at avlopið hjá landskassanum í 2002 var 191 mió krónur, og at hetta var *"40 mió. krónur meira enn mett"*.

Í Degi og Viku sama kvøldið varð sagt, at tá fíggjarlógin fyri 2002 varð samtykt, roknaði løgtingið við einum avlopi uppá 70 mió. krónur.

Hetta er ikki rætt. Tá fíggjarlógin fyri 2002 varð endaliga samtykt í desember 2001, vísti hon eitt avlop á 371 mió. krónur. Úrslitið (191 mió. krónur) var sostatt 180 mió. krónur verri enn mett varð á fíggjarlógini. – At onkur so kann hava mett umaftur seinni, er ein onnur søga.

Tær 70 milliónirnar, sum Dagur og Vika vísti til, er samlaða játtanin tá eykajáttanirnar, sum eru samtyktar ígjøgnum árið eru taldar við.

Tað at játtanin broytist frá 371 mió. í avlopi við ársbyrjar, til 70 mió. krónur við ársenda, er bert eitt dømi um vánaliga fíggjarstýring.

**Hvat fingu vit fyri pengarnar ?**
Í Degi og Viku varð sagt: *"Almennu útreiðslurnar seinastu árini eru vaksnar umleið eina milliard krónur. Karsten Hansen viðgongur, at hetta ljóðar av nógvum, men hann heldur, at vit hava fingið nógv fyri pengarnar, til dømis nýtt vaktarskip, nýtt Landssjúkrahús, Vágatunnilin og tveir triðingar av nýggja Suðuroyarskipinum eru eisini goldnir."*

Her er vert at leggja til merkis, at øll dømini, sum verða nevnd, eru íløgur, meðan vøksturin á fíggjarlógini er fyrst og fremst rakstur. So tað er ikki hetta, vit hava fingið fyri øktu útreiðslurnar.

Ein íløga verður gjørd eina ferð, og so er hon úti av verðini. Men tað at rakstrarútreiðslurnar eru vaksnar við einari heilari milliard merkir, at vit gjalda eina milliard eyka á hvørjum ári.

At tveir triðingar av Suðuroyarskipinum eru goldnir er ikki rætt – og slettis ikki, tá vit tosa um fíggjarárið 2002. Í 2002 vóru 91 mió. krónur goldnar av Suðuroyarskipinum (sum kostar meira enn 300 mió. krónur at byggja). Rokna vit so eisini havnina á Drelnesi við, so eru framvegis 3/4 av íløguni eftir, sum ikki síggjast á landskassaroknskapinum.

Spurningurin er ikki, hvussu nógvar íløgurnar eru í tali, men heldur hvussu nógvar av teimum eru goldnar.

**Onnur úttalilsi**
Dagur og vika segði eisini um landskassaroknskapin: *"Avlopið í fjør stavar bæði frá fleiri inntøkum og minni nýtslu."*

At nýtslan minkaði í fjør er ikki rætt. Líkamikið um samanborið verður við árið 2001 ella um samanborið verður við fíggjarlógina fyri 2002, so vaks nýtslan.

Av øðrum misvísandi útsøgnum, sum fjølmiðlrnir høvdu um landskassaroknskapin kunnu nevnast hesi: *"Heildarveitingin úr Danmark seinastu árini er minkað 366 mió. krónur um árið"* (Dagur og Vika). *"Nú hevur Landskassin (og tað er kassin hjá tær og mær) umleið 2,7 mia. krónur í Landsbankanum."* (Útvarp Føroya). Rætta talið, sambært Landsbankanum sjálvum er knappar 2,5 mia. á nýggjárinum, og góðar 2,3 mia. nú.

**Gongur skjótt skeiva vegin**
Landskassaavlopið áðrenn avdrøg minkaði í 2002 við meira enn hálvari milliard (506 mió. krónir). Neyvan finst nakað annað land í heiminum, har landsins leiðsla vildi reypað av, at avlopið minkaði við meira enn 27 prosentum eftir einum ári.